# HEILSANIR



OMG! Nú byrjar at ganga skeiva vegin. Sjálvt um tú eldist, so hoyrist tú betri enn nakrantíð. Tillukku við 30 ára degnum. Gleða okkum til 12. feb.
Vóna at fáa eina innbjóðing.
**Ynkja Rósusa kelidjór**



**Góði Jan og Bogi**
Vit ynskja tykkum hjartaliga tillukku við 9 ára degnum.
**Heilsan babba, mamma, Lív og Ingi**



**Til PB xxx**
Bert ein heilsan á runda degnum, og ein áminning á nakrar stuttligar dagar í Klaks.
**PD660**



**Góði elskaði sonur og beiggi**
Hjartaliga tillukku við 20 ára degnum 29. jan., og góða eydnu í framtíð tíni. Eisini ynskja vit tær tillukku við læruplássinum. Við tínum viti og smíli, hjálpsemi og kærleika til tíni smáu systkin, gert tú lívið hjá øllum tínum kæru ríkari. Takk fyri alt tú ert fyri okkum.
**Mamma og babba, Magnus, Lea og Barbara. Ruth omman og Bill abbi senda eisini eina heilsu við ynskjum um Harrans signing í framtíðini**



**Hey Gert góði**
Hjartaliga tillukku við 23 ára degnum, tann 31/01. Vónandi fært tú ein góðan føðingardag, langt úti á havinum. Og hvør veit, kanska kokkurin bakar eina góða kaku:)) Eisini ein heilsan til restina av "the gang". Vit sakna tykkum, og gleða okkum at síggja tykkum aftur.
Harrin vælsigni tykkum.
**Vinarliga - Ja, tað er ikki so torført at gita**



**Góði Petur Ovi**
Hjartaliga tillukku við 9 ára degnum 27 januar, gleða okkum at koma í føðingardag hjá tær. Eisini ein heilsa til Ára og Sámuel, sum eru fyltir 14 og 5 ár og Martin sum verður 11 ár í mars, tit eru allir nakrir deiligir dreingir.
Muss og klemm
**Heilsan omma og abbi á Norasta Horn**



**Til PB xxx**
Hjartaliga tillukku við degnum 1. feb.
**Heilsan PD660**



**Góða Tinna, Mikkjal og Hjálmar**
Tillukku við 9, 7 og 1 ára føðingardøgunum.
**Ynskja omma og abbi í Lynggøtu**



Hjartaliga takki eg øllum, sum mintust meg á mínum 70 ára føðingardegi, 31. desember 2009.
Takk til tykkum mongu, sum vóru við til at gera mær dagin í Posthúskjallaranum so hugnaligan og minnisríkan. Takk til tykkum, sum ikki kundu vera við, men sum á ymiskan hátt heilsaðu mær á degnum.
At enda vil eg eisini takka tykkum øllum, sum hjálptu til og gjørdu tað møguligt at halda dagin.

**Erhard Mortensen**

Sosialurin *Heilsanir*
kr. 30,-

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 1 dag fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Mán. ☐ Týs. ☐ Mik. ☐ Hós. ☐ Frí.

Tekstur: ____________________________________________

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ____________________
Bústaður: ____________________
Bygd/býur: ____________ Tlf.: ____________

Sendið lepan, v/mynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<